# ítt lív



UPP ALT

*Sum urguleikari hevur Sigmund Rasmussen spælt eitt ótal av sálmum gjøgnum tíðirnar. Tað eru kortini ein sálmur, ið honum dámar væl, fyri ikki at siga allarbest - sálmurin "Upp alt, ið Harrin hevur gjørt". - Hetta er ein fantastiskur sálmur. Lagið er sera gott, og orðini eru uppaftur betri, sigur hann*

**Tá eg eri heima, tá spæli eg nógv – ofta fleiri tímar um dagin**



SÁLMASANGUR

*Sigmund Rasmussen letur væl at sálmasanginum í Oyndarfjarðar kirkju. - Er nógv fólk í kirkju, gongur sangurin serliga væl, sigur hann*

# Frá pípu til elektronikk

Seinastu í 70'unum fekk Oyndarfjarðar kirkja nýggja urgu, ið hevur verið í nýtslu heilt upp til henda dag.

Men um ein mánað hevur gamla urgan tænt fyri seg, tí tá fær kirkjan eina nýggja elektronisku urgu frá Allen Organ Company í USA. Hetta er ein urga av sama slagi sum longu nú verður brúkt millum annað í samkomuhúsunum Betesda í Klaksvík, Siloa í Fuglafirði, Berøa í Runavík og í Nes kirkju.

Fyrimunurin við hesi urguni er, at hon í roynd og veru ikki krevur ein urguleikara. Hon er soleiðis skipað, at her kunnu sangirnir verða spældir inn og síðani brúktir aftur til gudstænastu, bert við at ein persónur trýstir á nakrar ávísar knøttar og síðani á START.

Nýggja urgan verður sett upp frammi í kóri, til høgru fyri altarið, samstundis sum tveir hátalarar verða settir upp hvørjumegin altarið.

Tann stóri spurningurin er, um tann fasti urguleikarin verður heima, tá hetta hendir, tí óvist er um hann ikki longu er farin umborð aftur um hetta mundið.

– Um eg ikki nái tað hesaferð, so fari eg í øllum førum at spæla uppá hana, eins og vanligt, tá eg komi aftur. Tað síggi eg fram til, sigur Sigmundur spentur á málinum.